# Skúlabørn settu búmerkir á Kiwanis hjálmar

Fyrrapartin í gjár vóru 2. og 6. flokkur í Adventistaskúlanum í Havn úti í nýggja bygninginum hjá Eimskip á Skansabryggjuni og settu búmerkir á umleið 700 súkkluhjálmar. Hetta eru teir kendu Kiwanis hjálmarnir sum allir 1. flokkarnir í Føroyum fáa. Talan er um eitt felags tiltak sum Kiwanis, Ferðslutrygd, MBM, Føroya Sparikassi og Eimskip standa fyri. Hetta er fyrstu ferð at skúlabørn sleppa at seta búmerkini hjá Kiwanis, Ferðslutrygd, MBM, Føroya Sparikassa og Eimskip, á hjálmarnar. Í vár verða so hjálmarnir sendir til allar 1. flokkarnar í landinum.



*Børn úr Adventistaskúlanum klistra her búmerki á hjálmarnar í nýggju hølunum hjá Eimskip á Skansabryggjuni í Havn*


Starv í Føroya Banka

## Húsavørður

Eitt starv í fyrisitingardeildini sum húsavørður í Føroya Banka er hervið leyst at søkja.

Fyrisitingardeildin varðar av bygningum bankans, og fevnir hetta um umsiting og viðlikahald av 24 deildum kring um Føroyar.

**Starvið**

Dagliga starvið fevnir um:

- umsjón við og viðlikahald av deildum bankans í Havnini
- at standa fyri og samskipa arbeiði við ábøtum á bygningar, innbúgv v.m
- at vera við í gerð av ætlanum fyri framhaldandi menning av deildum bankans
- at luttaka í arbeiðinum á goymsluni, ið fevnir um ordra/innkeyp og goymslustýring
- at standa fyri skjala- og vørugoymslu bankans
- aðrar fyrifallandi uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi

**Førleiki**

Søkt verður eftir handverkara ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving, og skal tann, ið verður settur, hava góð samstarvsevnir og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur útbúgving sum húsasmiður, men er hetta eingin treyt.
Ert tú áhugaður, kunnu vit bjóða eitt spennandi og sera fjølbroytt starv, ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Treytir**

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

**Umsókn**

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildin
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tel. 311350.



FØROYA BANKI



# Bilar

Nr. 40 • hósdagur • 27. februar 2003 • 77. árg.




*Jóhannes Berg byrjaði at selja bilar í 1960. Fyrst amerikanskar Rambler bilar, síðan japanskar Mazda bilar. Í dag selur Berg Motors bilmerkini Mazda og Scania*

# Berg Motors – selt Mazda í 35 ár




*Starvsfólk hjá Berg Motors í Havn: f.v. Jens Lundblad, Michael Johansson, Saroya Dalsgarð, Hilmar Joensen, Lis Joensen Tummas Reinert, Jóhan Kristian Højgaard, Axel Ljósheim, Jákup Jacobsen, Delmar Jacobsen, Ásmund Joensen, Ási Svensson, Rógvi Sigurðsson, Hálvdan Dalsgarð, Karin C. Hammer og Claudiu Manolescu.*

**Tann 1. mars 1968 var føroyski bilasølumaðurin, Johannes Berg, í Japan og skrivaði undir sáttmála við Mazda bilverksmiðjuna um beinleiðis innflutning av Mazda bilum til Føroyar. Fyrstu bilarnir vóru komnir árið fyri, í 1967**


BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*


35 ár eru liðin, síðan Jóhannes Berg skrivaði undir sáttmála við Toyo Kogyo bilverksmiðjuna í Japan um beinleiðis innflutning av Mazda bilum til Føroyar.

Johannes hevði tá innflutt amerikansku Rambler bilarnar síðan 1960. Tá hann í 1966 var á fundi við amerikansku stjórarnar á Rambler bilverksmiðjuni, American Motors, søgdu teir honum, at japanska Toyo Kogyo bilverksmiðjan leitaði eftir innflytarum av Mazda bilunum í Evropa. Teir hildu, at Mazda skuldi verið eitt gott alternativ hjá Jóhannes Berg at havt afturat Rambler bilunum. Teir fyrstu fimm Mazda bilarnir komu í 1967 sum ein roynd. Tað vísti seg skjótt, at stórur áhugi var fyri Mazda bilunum í Føroyum. Tað skuldi eisini vísa seg, at Jóhannes var á røttum stað til rætta tíð. Hetta var um tað mundið, tá valutaloyvini vórðu tikin av, og fólk byrjaðu at keypa privatbilar. Tann 1. mars 1968 skrivaði Jóhannes undir sáttmála við Toyo Kogyo um beinleiðis innflutning av Mazda bilum til Føroyar. Hann legði fastan ordra inn til teir um at fáa 20 Mazda bilar um mánaðin. Fólk hildu mannin vera svakan, 20 bilar um mánaðin. Men veruleikin var, at fólkið hungraði eftir bilum. Valutaloyvini vóru tikin av, og nú kundu øll frítt keypa bil. Mazda bilarnir lógu sera væl í prísi. Tann minni, Mazda 1200, kostaði í bíligastu útgávuni 15.700 krónur og tann størri, Mazda 1500, kostaði umleið 18.000 krónur. Mazda var frá byrjan av ein "succes".

## Byggja virkisbygningar

Skrivstovan og eykalutagoymslan hjá Berg Motors var í húsunum hjá Jóhannes Berg í J. Paturssonargøtu, og verkstaðurin var við Heygsvegin, har sum Triv heldur til í dag. Sølan av Mazda bilum vaks alsamt um alt landið. Fyri at veita kundunum í Eysturoynni betri tænastu keypti fyritøkan ein bilverkstað á Glyvrum. Hetta var umleið 1970. Eisini blivu avtalur gjørdar við umboðsmenn aðrastaðni í landinum.

Fyritøkan fekk eisini Chrysler umboðið. Teir seldu tá bilmerkini Simca, Sunbeam, Chrysler, Plymouth og Dodge. Seinni í 70-unum keypti Jóhannes elementvirkið á Norðskála frá Árna Brattaberg, og fekk hann fyrrverandi byggimeistaran í Havn, Petur Michelsen, at standa fyri virkinum. Hetta kom væl við hjá Jóhannes Berg, ið hevði ætlanir um at byggja tveir stórar bygningar, ein á Hálsi í Havn og ein á Glyvrum - har sum Bónus er í dag.

Bygningurin á Hálsi varð bygdur á miðstaðarøkinum, har seinni komu fleiri aðrir handilsbygningar. Tá teir eisini fingu umboð fyri Scania lastbilar og bussar, kom tað væl við at hava ein stóran virkisbygning. Fyritøkan hevur eisini Avis bilútleigan.

Í mong ár var Mazda mest selda bilmerki í landinum. Í sambandi við at 35 ár eru liðin, síðan sáttmálin millum Mazda bilverksmiðjuna í Japan og Berg Motors varð undirskrivaður, verður opið leygardagin 1. mars frá kl. 10-16 við nógvum góðum tilboðum.